ítróttur

Nr. 99 • týsdagur • 27. mai 2003 • 77. árgangur • www.sosialurin.fo

# Hans Fróði vrakaður til stóru avbjóðingarnar

**Umframt B68 miðverjan hevur Henrik Larsen valt at síggja burtur frá Heðini á Lakjuni og Helga L. Petersen, meðan Johan B. Hansen, Ingi Højsted, Atli Danielsen og Jónhard Frederiksberg eru í hitanum**

LANDSLIÐIÐ
*Jóannes Hansen*



*Hans Fróði Hansen stóð ikki royndina um vikuskiftið, og er hann tí ikki við í føroyska landsliðshópinum til teir báðar komandi dystirnar*

Henrik Larsen var á Skála leygardagin fyri við egnum eygum at staðfesta, um Hans Fróði Hansen er mest upplagda valið til miðverjuplássið, sum stendur tómt ímóti Íslandi, nú Óli Johannesen og Pól Thorsteinsson eru leikbannaðir.

Dómurin yvir avrikið hjá Hans Fróða Hansen kom í gjár, tá ið Henrik Larsen boðaði frá, hvørjar spælarar hann vil hava við til Íslands annan mikudag. Hans Fróði Hansen er ikki millum teir tjúgu, sum hava fingið boð.

Sunnudagin var Henrik Larsen í Vágum og eygleiddi Súna Olsen. Ungi maðurin í GÍ gjørdi góða reklamu fyri sær sjálvum, hann spældi allar 90 minuttirnar, hann skoraði annað GÍ málið við frísparksperlu, og harvið negldi hann rimmar fast, at hann er tøkur í Íslandi annan leygardag.

Sjálvandi verður tað ikki fyrrenn sjálvan dystardagin greitt, hvønn spælara Jón Rói Jacobsen skal hava undir liðini á sær í miðverjuni. Men úttøkan bendir á, at valið fer at standa millum Johan B. Hansen og Jóhannis Joensen.

Jóhannis Joensen varð sendur til hús eftir fyrra dystin ímóti Kasakstan. Tá varð sagt, at hetta ikki skuldi skiljast sum uppsøgn, men heldur tí venjarin vildi viga onkran annan í seinna dystinum, og nú er Jóhannis aftur í hitanum. Johan B.Hansen spælir í Horsens í næstbestu donsku deildini. Hann fekk ikki landsliðsboð undan dystunum ímóti Kasakstan, men nú vil venjarin hava danskaran við føroysku foreldrunum ímillum teir átjan, sum liðið ímóti Íslandi skal veljast ímillum.

Pól Thorsteinsson og Óli Johannesen verða sjálvskrivaðir ímóti Týsklandi. Tá sleppa tveir av teimum, sum fáa boð ímóti Íslandi, ikki at sita á beinkinum, men skulu heldur út millum áskoðararnar at sita.

Heðin á Lakjuni spældi við í fyrra dystinum ímóti Kasakstan, og tá skoraði hann fyri fyrstu ferð á landsliðnum. Hann var ikki í hópinum undan seinna dystinum, og nú er hann aftur settur uttanfyri. Tað er Helgi L. Petersen eisini, og pláss er heldur ikki fyri Símuni Samuelsen úr GÍ.

## Nýggja ættarliðið

Í tjúgu manna hópinum eru fleiri spælarar, sum undanfarnu árini hava verið á yngru landsliðunum, og sum ikki áður hava roynt seg í undankappingardystum. Her verður hugsað um Inga Højsted úr Arsenal, Atla Danielsen, úr KÍ, Jann Inga Petersen úr B68 og Jónhard Frederiksberg av Skála, sum fyrstu ferð nakrantíð var í landsliðshitanum, tá ið liðið var á venjingarlegu í Spania í vetur.

Merkisvert er tað eisini, at landsliðsvenjarin hevur valt framvegis at halda Christian Høgna Jacobsen í hitanum, sjálvt um hann í vár hevur spælt ógvuliga lítið á besta liðnum hjá Vejle.

Teir tjúgu, sum hava fingið landsliðsboð, eru hesir: Jákup Mikkelsen, Molde, og Jens Martin Knudsen, NSÍ, eru málverjar. Hinir eru Fróði Benjaminsen og Jann Ingi Petersen úr B68, Jóhannis Joensen, FS Vágar, Julian Johnsson, Jákup á Borg og John Petersen, B36, Súni Olsen, GÍ, Atli Danielsen og Hjalgrím Elttør, KÍ, Jónhard Frederiksberg, Skála, Rógvi Jacobsen og Andrew av Fløtum, HB, Ingi Højsted, Arsenal, Christian Høgni Jacobsen, Vejle, Jón Rói Jacobsen, Brøndby og Johan Byrial Hansen, Horsens. Og so eru tað Óli Johannesen, Hvidovre, og Pól Thorsteinsson, B36, sum ikki eru tøkir í fyrra dystinum.

Úttøkan vísir, at landsliðsspælararnir eru úr so at siga øllum landinum. Øll feløgini í bestu deildini eru umboðað uttan VB og EB/Strreymur. Úttøkan vísir eisini, at útisetarnir eru nógv færri, enn teir onkuntíð hava verið. Teir eru Jákup Mikkelsen, Jón Rói Jacobsen, Christian Høgni Jacobsen, Johan B. Hansen og Ingi Højsted og í seinna dystinum eisini Óli Johannesen.

Landsliðið fer til Reykjavíkar mikudagin í næstu viku, og tað verður flogið heim aftur beinanvegin leygarkvøldið, eftir at dysturin á Laugardalsvøllinum verður av.

## Íslendski hópurin móti Føroyum

Íslendski landsliðsvenjarin, Ásgeir Sigursson hevur tikið hesar 18 leikarar út til landsdystin móti Føroyum

| Navn | Felag | dystir/mál |
|---|---|---|
| Birkir Kristinsson | ÍBV | 73/0 |
| Árni Gatur Árason | Rosenborg BK | 27/0 |
| Rúnar Kristinsson | Sporting Lokeren | 98/3 |
| Guðni Bergsson | Bolton Wanderers | 78/1 |
| Arnar Grétarsson | Sportin Lokeren | 59/2 |
| Hermann Hreiðarsson | Charlton Athletic | 47/2 |
| Helgi Sigurðsson | Lyn | 45/9 |
| Þórður Guðjónsson | Vfl Bochum | 44/11 |
| Lárus Orri Sigurðsson | West Bromwich Albions | 39/2 |
| Brynjar Bjørn Gunnarsson | Stoke City | 36/3 |
| Arnar Gunnlaugsson | KR | 32/3 |
| Tryggvi Guðmundsson | Stabæk | 30/8 |
| Arnar Þór Viðarsson | Sporting Lokeren | 24/0 |
| Eiður Smári Guðjohnsen | Chelsea | 22/7 |
| Marel Baldvinsson | Sporting Lokeren | 11/0 |
| Ívar Ingimarsson | Wolverhampton Wanderers | 11/0 |
| Jóhannis Karl Guðjónsson | Aston Villa | 11/1 |
| Indriði Sigurðsson | Lillestrøm | 8/0 |



# Vælleikandi Sokolov

**Nú sjey umfør eru leikt í sterku kappingini í Sarajevo, tykist tað sum um eingin kann steðga Ivan Sokolov. Tvey umfør skulu telvast aftrat**

TALV
*Carl Eli Nolsøe Samuelsen*




*Ivan Sokolov, sum nú umboðar Føroyar, hevur lagt seg trygt á odda í sterku altjóða kappingini í Sarajevo*

34 ára gamli Ivan Sokolov, sum nú umboðar Holland, kennur seg ivaleyst væl til rættis í heimbýi sínum Sarajevo í Bosnia-Herzegovina. Hann er styrkismettur fjórðhægstur aftanfyri Alexei Shirov, Rustam Kasimdzhanov og Evgeny Bareev, men hevur lagt teir væl aftur um seg, nú tvey umfør resta í.

## Oddamaður frá byrjan av

Sokolov, sum í árunum 1992-97 fleiri ferðir vitjaði Føroyar, og serliga Havnar Telvingarfelag, legði út sum ein stormur og hevði 2,5 stig eftir trimum umførum, og var tá saman við 16 ára gamla Radjabov á odda. Hesir báðir hittust í fimta umfari í einum sonnum oddabraki. Sokolov hevði hvíta fólkið, og varð eitt skifti í miðspælinum trýstur av unglinginum. Rutinan og sjálvandi eisini styrkur avgjørdi helst talvið, tá Sokolov seint inni í miðspælinum fekk lumpað Radjabov við einari taktiskari finessu.

Í triða umfari hitti Sokolov ratingfavorittin Shirov við svarta fólkinum. Ein tung uppgáva, og hóast at Shirov telvaði sína eyðkendu kompromileysu álopstelving, stóð Sokolov stinnur, og hevði, tá eldurin hevði lagt seg, enntá eina meirfinnu í endatalvinum. Ógjørligt var tó at vinna endatalvið, og javnleikur bleiv úrslitið. Eitt gott úrslit hóast alt hjá fryntliga talvvini okkara.

Ein eins avbjóðandi uppgáva hevði oddamaðurin í sjeynda umfari, tá hann førdi svarta fólkið ímóti Bareev. Eitt skifti hevði Bareev helst vinnandi fyrimun, men tað er ikki uttan orsøk, at Sokolov er kendur fyri at stríðast manniliga við tolsemi til síðsta leik. Hesin góði eginleiki gav honum loksins ein góðan javnleik djúpt inni í endatalvinum.

### Støðan eftir 7. umfar

| | |
|---|---|
| Sokolov (2677) | 5,5 |
| Kasimdzhanov (2680) | 4,5 |
| Movsesian (2659) | 4,5 |
| Radjabov (2644) | 4,5 |
| Shirov (2735) | 4,0 |
| Bareev (2734) | 4,0 |
| Kurajica (2551) | 3,5 |
| Kozul (2601) | 2,5 |
| Damljanovic (2587) | 1,0 |
| Dizdarevic (2491) | 1,0 |

Óvæntað er, at Shirov og Bareev ikki eru í absolutta toppinum. Bareev tapti tvey tey fyrstu umførini, og talan er tí um eitt gott comeback hjá honum, sum tó ikki verður nóg mikið til at vinna kappingina. Shirov hevur leikt heili seks javnleikir, og bert vunnið eitt talv. Ikki hansara vanligi stílur, men kortini hava talv hansara verið áhugaverd og drúgvir javnleikir.

Sokolov hittur Movsesian og Kasimdzhanov í seinastu umførunum. Tvær toppuppgerðir, sum Sokolov helst verður mettur sum favorittur at vinna vegna hansara góðu úrslit higartil og status sum oddamaður í 33rd Bosnia Tournament.

## Talvið hesa vikuna

**GM Radjabov,T (2644) — GM Dizdarevic,E (2491)**
Bosnia GM Sarajevo (6), 24.05.2003

**1.d4 d5 2.c4 c6 3.Ric3 Rif6 4.e3 e6 5.Rif3 Ribd7 6.Fc2 Bd6 7.g4!** (Kasparov leikti hendan leik móti talvforritinum Deep Junior í februar, og vann eitt gott talv) **7...Rixg4** (Deep Junior valdi tá dxc4. Hvat er betri, er ringt at siga. Svartur kemur í øllum førum at standa nakað kroystur um hann ikki tekur ímóti finnuni) **8.Rg1 Rih6** (Aðrir møguleikar vóru Rixh2, h5 ella Ff6) **9.Bd2** [9.Rxg7?? Ff6! sum setur á riddaran og rók í senn] **9...Rif8 10.e4 dxe4 11.Rixe4 Rif5 12.Rixd6+ Fxd6 13.0—0—0 Rig6 14.h4** (Radjabov er í hesum talvi í sonnum offuranda. Blakar alt frameftir, fyri at náa kongin. Rættiliga kompromileys telving!) **14...Rige7 15.Bd3 f6 16.h5 Kf7 17.Rg4 b5 18.Bf4 Fb4 19.Rdg1 bxc4 20.Bxc4 Rg8 21.a3 Fb6 22.Rih4!** (Svarta støðan heldur ikki ímóti aktiva trýstihátti Radjabovs) **22...Rid5 23.Rixf5 exf5 24.R4g3 a5 25.Rb3 Fa7** (Í hesum førinum átti svartur at tikið d-finnuna, sum eisini vardi riddaran og d5 puntin betri) **26.Bxd5+ cxd5 27.Fc6! Fa6 28.Fxd5+** (Ivasamt. Fc7+ hevði verið skjótari) **28...Be6?** (Besta boðið var Fe6) **29.Rb7+ Ke8 30.Re1 Rc8+ 31.Kd2 Rc6**



**Støðan eftir 31...Rc6**

**32.Fd7+** Bispurin er bundin og mát verður í næsta leiki. Flott álopstalv av undurbarninum úr Azerbadjan. **1—0**

